# Ov nógv suss í tinginum

Apríl



- Tað knípur alvorliga hjá tinglimum í bestu árum og góðum oyrum at hoyra, tað, sum fyriferst á røðarapallinum. So neyðars tey, sum ikki hoyra so væl, siga tingfólk

**Tingfólk eru misnøgd við hoyrilíkindini í tingsalinum, men løgtingsformaðurin heldur, at tingfólk sussa ov nógv, og tí hoyrist illa**

Løgtingshúsið er nú umbygt fyri næstan 80 milliónir. Men løgtingsmenn eru alt annað enn nøgdir við alt, sum er komið burturúr. Serstakliga eru teir illa nøgdir við hoyrilíkindini inni í sjálvum tingsalinum.

Vit hava tosað við fleiri tinglimir og teir eru allir samdir um, at hoyrilíkindini liggja til at vera onkustaðni ímillum sera vánalig og út av lagið syndarlig.

-Hetta er rætt og slætt ein neyðarróp, siga teir.

Tinglimir, sum sita aftarliga í tingsalinum fáa ikki alt við, sum verður sagt av tingsins røðarapalli og enn verri eru umstøðurnar hjá áhoyrarunum.

Hátalarar eru í hvørjum borði, men teir eru so spakuliga frá, at tann, sum ikki situr við oyranum klistraðum upp at hátalaranum, hoyrir onki.

Tinglimir, vit hava tosað við, halda, at tað er einki minni enn ein vanlukka at bjóða okkara lógarsmiðjunum slíkar umstøður.

- Kanska eru tinglimir ikki nóg friðarligir, men har er hvørt eftir øðrum. Tá ið tinglimir onki hoyra, verða teir ófriðarligir

- Tað knípur alvorliga hjá tinglimum í bestu árum og góðum oyrum at hoyra, tað, sum fyriferst á røðarapallinum. So neyðars tey, sum ikki hoyra so væl.

## Tað er ov nógv suss

Edmund Joensen, løgtingsmaður gevur partvís tinglimum sjálvum skyldina fyri, at tað hoyrist so illa í Løgtinginum.

Men tá ið tað er sagt, ásannar hann eisini, at ljóðviðurskiftini í tingsalinum eru nógv øðrvísi enn tey hava verið.

- Bæði gólv og veggir eru av viði og tí er ljóðið nógv harðari enn tað var í gamla tingsalinum, sum bæði var minni og hevði teppi á gólvinum.

Tí eru hoyrilíkindini nógv øðrvísi enn tey hava verið og tingsalurin tolir ikki, at tinglimir – og áhoyrarar- sita ófriðarligir.

Hann sigur, at tí er tað eitt krav til tinglimir, at teir sita stillir, tá ið teir eru í tingsalinum, tí skal tað hoyrast nóg væl, er tað eitt krav, at tað er púra friður í salinum.

- Tá ið tingið er fullmannað, eru vit 32 tinglimir, sjey landsstýrismenn, umframt embætisfólk og áhoyrarar. Sostatt er skjótt, at vit eru eini 50 fólk innanveggja og tað krevur eitt sindur av sjálvaga frá øllum pørtum, annars hoyrist ikki, soleiðis sum tingsalurin nú er.

Hinvegin eru hátalarar í salinum og hátalarar í hvørjum borði hjá tinglimum og men teir eru ikki nóg væl stillaðir og tað verður arbeitt við at fáa ljóðið betri í hátalarunum.

- Men treytin er framvegis, at tinglimir sita friðarligir og lurta fyri at kunna hoyra tað, sum verður sagt av røðarapallinum.

Hann sigur, at tá ið tað er friðarligt í salinum og ljóðið er í lagi, riggar alt av besta slagi.

*- Eg vil fegin uppliva landið og fólkið, sum har býr. Eg kundi t.d. hugsað mær at sloppið til døgurða heima hjá onkrum eldri føroyskum pari, gjarna einum pari, sum í veruleikanum ræðast sex eitt sindur. Eg ætli mær eisini at fara í býin og uppliva býarlívið, drekka meg fulla.*

*Joan Ørting, danskur sexologur*

*- Við hvørt droymi eg meg eitt sindur aftur í tíðina, tá ið alt var opið, og møguleikarnir óteljandi. So hvørt sum árini ganga, latast hurðar aftur, og tú velir eina leið at ganga. Samstundis sum tú missir møguleikar í tínum lívi, er tað eisini ein lætti at sleppa frá at velja, sleppa undan nøkrun møguleikum og liva lívið.*

*Eyðun Nolsøe, tónleikari*

## Ætlaði sær ikki at vera stjóri

Mikkjal Helmsdal verður settur sum stjóri í Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum, og tað kom eitt sindur óvart á hann.

- Hetta er eitt arbeiðspláss, eg altíð havi droymt um at sleppa at arbeiða á. Men um eg akkurát havi droymt um at verða skúlastjóri, skal eg ikki siga, sigur Mikkjal Helmsdal

Men tað er ein avbjóðing, hann er til reiðar at átaka sær, annars hevði hann neyvan søkt starvið, tá ið tað varð lýst leyst, eftir at Mads Andrias Winther segði seg frá.

## Reproz vinnari

Lýsingafyritøkan ReproZ var stóri vinnarin, tá ið tiltakið Ársins Lýsingar Kolan 2007 var hildið. Funnið var fram til tær bestu lýsingarnar og lýsingarherferðinar farna árið, og av ReproZ fór avstað við meira enn helminginum av virðislønunum. ReproZ vann fimm av nýggju prísum. Sangir vann tvær kolur, meðan Petur & Petur og Krea fingu hvør sína.

## Fólkaræði fram um átrúnað

Danski politikarin Naser Khader, sum sjálvur er av arabiskum uppruna, vitjar í Føroyum. Hann heldur fyrilestur í Miðlahúsinum og vitjar ymsastaðni. Hann verður millum annað spurdur um, hvat hann heldur um samanblanding av politikki og átrúnaði:

– Tá religión og demokrati stoyta saman, so er ongin ivi um, at vit eiga at taka demokartiið fram um, svarar Naser Khader.